FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY

## Stýrimaður til
# »Magnus Heinason«

Til »Magnus Heinason« verður søkt eftir avloysara fyri stýrimann, sum er farin í annað starv. Starvið verður sett til 6. juni 2008.

»Magnus Heinason« ger kanningar fyri Fiskirannsóknarstovuna, m.a. av havfrøði, æti, yngli, botnfiski, uppsjóarfiski og reiðskapi. Ein part av tíðini er skipið eisini til vanligan fiskiskap. Stýrimaðurin skal saman við skiparanum hava ábyrgdina av at føra skipið og annars gera tað arbeiðið, sum vanliga hoyrir stýrimanninum til og sum eru álagdar honum av skiparanum. Stýrimaðurin hevur eisini dagligu ábyrgdina av at stíla fyri arbeiðinum á dekkinum.

Stýrimaðurin skal hava hollar royndir og hava neyðuga útbúgving og vinnubræv og annars uppfylla øll krøv, sum vera sett av myndugleikum til tann, sum skal útinna starvið.

Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Umsóknarfreistin er 10. juli 2007. Umsóknir við prógvum, yrkisgongd (curriculum vitae), viðmælum o.ø. skulu sendast til Fiskirannsóknarstovuna, Postrúm 3051, Nóatún 1, FO 110 Tórshavn. Starvið verður sett skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna á tlf. +298 353900.



## Hýruvognsloyvi

Í Tórshavnar kommunu er eitt hýruvognsloyvi leyst at søkja.

Vísast skal á, at sambært grein 8 í reglugerðini um hýruvognsstøðir í Tórshavnar kommunu, skulu umsøkjarar hava váttan fyri, at teir koma at koyra frá støð. Loyvið er tengt at bilstøðini Auto.

Umsóknarblað fæst í Snarskivuni. Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 29. juni 2007.

**Tórshavnar kommuna**

Føroya Studentaskúli og HF-skeið
Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 · Telefax 318624

# Hjálparfólk til kantinuna

Søkt verður eftir einum hjálparfólki til kantinuna, at byrja 13. august 2007. Vit leggja dent á, at fólkið, ið sett verður er raskt, álítandi og nærlagt í sínum arbeiði. Tað er ein fyrimunur, um tú ert von/vanur við køks- og/ella kantinuarbeiði.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Arbeiðstíðin er mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til 15.00 og fríggjadag frá kl. 8.00 til 14.30, teir dagar tá skúlagongd er.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til kantinuleiðaran á tlf. 313771.

Skrivligar umsóknir við møguligum viðmælum skulu verða rektaranum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2007.



## Ford Fiesta ST 2.0 til sølu

Árg. 2007. 150 hk, sportsetur, sóltak, 17" alu-felgur, 16" alu-felgur, orginalt tónaðar rútar og mangt annað.

Til sølu fyri 190.000 kr

**Tlf 50 55 50**

## Tvingsilssøla

**Týsdagin tann 10. juli 2007, kl. 11.00,** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 323, Froðba – Tvøroyri,** liggjandi Sjógøtu 62 (AS nr. 2-11/2007)

Sambært skráseting av ognini er talan um eini eldri sethús, kløðd við timbri og takt við tjørupappi. Húsini hava 3 hæddir á 42 m², harav kjallarahæddin er deilvíst krúpikjallari. Grundøkið er 172 m².

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:
**Miðhædd:** Gongd, køkur, stova og vesi.
**Lofshædd:** Kamar, stova og vesi.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv. Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4817401), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 14/6-2007*

## Tvingsilssøla

**Týsdagin tann 10. juli 2007, kl. 10.00,** verður á Dómaraskrivstovuni, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 671c Froðba, Tvøroyri**

Ognin er eitt grundstykki til støddar 903 m² við ástandandi sethúsum. Húsini eru bygd úr betong og timbri. Takið er úr stáli. Húsini eru í trimum hæddum. Kjallari 106 m². Stovuhædd 114 m² og loftshæddin 106 m².

**Fríða Patursson, advokatur, Fr. Petersensgøta 9, 100 Tórshavn, tlf. 311145, frp@jura.fo (j.nr. 20040358)** hevur biðið um tvingsilssøluna, og kann geva nærri upplýsingar um ognina. Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 13/6-2007*

Lesið
Sosialin

SUNDA KOMMUNA

# Móttøka

**Í sambandi við at felagshúsið frammi við vøllin í Streymnesi alment verður handað EB/Streymi, verður móttøka í húsinum sunnudagin 17. juni 2007 frá kl. 15.00-18.00.**

**Heðin Zachariasen borgarstjóri og Asbjørn Djurhuus formaður í Trivnaðarnevndini flyta fram røðu.**

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**

**Sunda kommuna**

# FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74